HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

26. mai 2017
Mál: 17/00430-3
Viðgjørt: HH

# (Uppskot til)

Kunngerð

um

fyribyrging og týning av rottu

Við heimild í § 4, stk. 1, § 5, stk. 3, § 6, stk. 2, § 69 og § 72, stk. 3 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, verður ásett:

*Myndugleikar*

**§ 1.** Kommunustýri hava ábyrgd av fyribyrging og týning av rottu í bæði bygdum sum óbygdum økjum í kommununi, umframt viðvíkjandi útbúnaði á sjónum, og rinda útreiðslurnar til hetta.
*Stk. 2.* Kommunustýri skulu fyri hvønn bý og hvørja bygd hava skikkað aktingarfólk at taka sær av skyldum kommunustýrisins sambært hesi kunngerð.
*Stk. 3.* Kommunustýri skulu gera árligar uppgerðir yvir framd átøk at fyribyrgja og týna rottu og lata Umhvørvisstovuni avrit av uppgerðini.

**§ 2.** Umhvørvisstovan er heimilað at umsita, innflyta, goyma og útflýggja útgerð, eitur og annað tilfar til kommunurnar og aktingarfólk teirra at brúka í sambandi við at fyribyrgja og týna rottu.
*Stk. 2.* Umhvørvisstovan samskipar fyribyrging og týning av rottu, og hevur heimild at áleggja kommunustýrum at skipa rottutýningina eftir ávísum leisti.
*Stk. 3.* Umhvørvisstovan savnar og ger árligar uppgerðir yvir framd átøk at fyribyrgja og týna rottu um alt landið.

*Skilhald og fráboðan*

**§ 3.** Allir eigarar og leigarar av fastogn í bygdum sum óbygdum øki, íroknað fastar og flótandi eindir á sjónum, skulu tryggja, at rotta hvørki sleppur inn ella støðast millum hús, við bygningar, úthús, fjós, brunnar, rør, fóðurflakar, før o.a. Tilfar og leivdir, sum kunnu draga rottu at sær, skulu beinast burtur.

**§ 4.** Ein og hvør, ið varnast rottu, uttan mun til hvar, skal beinan vegin boða kommunustýrinum frá. Kommunustýri skulu upplýsa og almannakunngera, á hvønn hátt og hvagar fráboðanir um rottu skulu latast.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

*Stk. 2.* Kommunustýrið skal í seinasta lagi 3 yrkadagar eftir eina fráboðan um rottu, fremja eftirlitsvitjan á staðnum, og skal beinan vegin seta neyðug tiltøk í verk ella geva boð um, hvørji tiltøk skulu setast í verk.
*Stk. 3.* Eigari, leigari, festari og brúkari hevur skyldu til at lata kommunustýrinum ella umboðsfólki teirra og Umhvørvisstovuni allar viðkomandi upplýsingar.

*Rottutýning*

**§ 5.** Kommunustýrið skal fyribyrgja, at rotta spjaðist ella støðast, og, har rotta er staðfest, regluliga týna rottu í bygdum sum óbygdum øki, íroknað umborð á eindum á sjónum, sambært vegleiðing frá Umhvørvisstovuni um fyribyrging og týning av rottu.
*Stk. 2.* Øll hava skyldu at hjálpa til at fyribyrgja ella týna rottu, tað veri seg eigarar, leigarar og brúkarar av húsum, bygningum og økjum umframt eigarar, festarar, leigarar og aðrir brúkarar av lendi og røktingarfólk teirra.
*Stk. 3.* Í sambandi við fyribyrging og rottutýning hava kommunustýrið og Umhvørvisstovan, við samtykki frá eigara ella leigara, ella við rættarúrskurði, atgongd at øllum privatum sum almennum ognum og lendi.
*Stk. 4.* Umhvørvisstovan kann áleggja kommunustýrum at týna rottu á ávísan hátt og ávís tíðarskeið á árinum fyri á tann hátt at tryggja eina samskipaða rottutýning.
*Stk. 5.* Kommunustýrið og Umhvørvisstovan skulu kunna eigarar, leigarar, festarar o.o., tá rottueitur verður lagt út.

*Rottufríar oyggjar*

**§ 6.** Rottufríu oyggjarnar í 2017 eru Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Nólsoy, Hestur, Koltur, Sandoy, Mykines, Skúvoy, Stóra Dímun og Lítla Dímun og hólmarnir Mykineshólmur, Trøllhøvdi, Tindhólmur og Gáshólmur.
*Stk. 2.* Kommunustýrið skal seta upp skelti á fleiri tungumálum við kunning um rottu, fráboðanarskyldu og rottufyribyrgjandi tiltøk á farstøðum, bryggjum og tyrlupallum, haðani farið verður til rottufría oyggj.
*Stk. 3.* Eigarar ella leigari av skipum og bátum, sum regluliga sigla til rottufríar oyggjar, skulu seta upp skelti umborð við kunning um rottu, fráboðanarskyldu og rottufyribyrgjandi tiltøk, sambært vegleiðingini frá Umhvørvisstovuni um fyribyrging og týning av rottu.

**§ 7.** Øll, sum flyta fólk, fæ ella farm til rottufría oyggj, skulu tryggja, at rotta ikki verður flutt við teimum út á rottufría oyggj.
*Stk. 2.* Tann, sum rekur far, sum siglir ella flýgur til rottufría oyggj, skal hava regluligt eftirlit við, um rotta er umborð, og, har tað er gjørligt, skulu rottufellur og rottueitur altíð vera umborð.
*Stk. 3.* Tann, sum eigur ella rekur undirsjóvartunnil til rottufría oyggj skal áhaldandi hava eftirlit við, um rotta er í tunlinum, og skulu rottufellur og rottueitur altíð vera í tunlinum.
*Stk. 4.* Virki, heilsølur, handlar o.o., ið senda vørur til rottufría oyggj, skulu tryggja sær, at vøran ikki er fongd við rottu, og at vøran er pakkað ein hátt, so rotta ikki kann sleppa framat.
*Stk. 5.* Vøra og farmur, ið skal sendast til rottufría oyggj, skal vera nýpakkað og má ikki goymast úti. Avskiparin skal skrivliga leggja váttan við, at vøran er eftirkannað fyri rottu síðstu tveir tímarnar undan avskipan.

**§ 8.** Kommunustýri, ið varða av rottufríum oyggjum skulu regluliga skipa fyri yvirvøku av rottu í oynni. Yvirvøkan skal gerast sambært vegleiðing frá Umhvørvisstovuni um fyribyrging og týning av rottu og úrslitini latast Umhvørvisstovuni.
**§ 9.** Fær kommunustýrið fráboðan um rottu í rottufríari oyggj, skal kommunustýrið beinan vegin seta neyðug tiltøk í verk fyri at bøta um skaðan umframt varskógva Umhvørvisstovuna.

*Goymsla og handfaring av rottueitri*

**§ 10.** Rottueitur skal altíð goymast innilæst, soleiðis, at óviðkomandi ikki sleppa fram at tí.
*Stk. 2.* Tá rottueitur verður lagt út, skal ansast eftir, at óviðkomandi fólk, fæ, fuglur, húsdjór o.o. ikki sleppa at tí.
*Stk. 3.* Tá rottueitur verður útflýggjað til eitt nú aktingarfólk, hjálparfólk, røktingarfólk o.o., skal kunning og vegleiðing latast við um hvussu eitrið skal handfarast, goymast og leggjast út, tað veri seg í óbygdum sum bygdum øki, í økjum, har fólk gongur ella heldur til, í bygningum og á økjum, har fólk býr, arbeiðir ella heldur til í styttri ella longri tíð o.s.fr.

*Boð, eftirlit, gjald og kæra*

**§ 11.** Kommunustýrið kann áleggja øllum eigarum, leigarum og brúkarum av bygningum og økjum, herundir bústøðum, fjósum, vinnubygningum o.ø. at seta tiltøk í verk at fyribyrgja og týna rottu. Sama kann verða gjørt mótvegis teimum, ið hava skip, bátar, ruskvognar, lastbilar, húsvognar, fóðurflakar ella annað, sum kann bera rottu við sær.
*Stk. 2.* Um boð sambært stk. 1 ikki verða fylgd innan ásetta freist, kann kommunustýrið fremja neyðugar atgerðir fyri rokning tess, ið ábyrgdina hevur.
*Stk. 3.* Umhvørvisstovan kann geva kommunustýrinum, kommunalum havnum og interkommunalum felagsskapum boð um tiltøk, sum eru nevnd í stk. 1, tá kommunan, havnin ella felagsskapurin er eigari av lendi, uttandura økjum, bygningum, rørleiðingum ella annað.

**§ 12**. Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at reglurnar í hesi kunngerð verða hildnar.
*Stk. 2.* Kommunustýrið hevur eftirlit við, at boð, sum kommunustýrið hevur givið, verða lýdd.

**§ 13.** Avgerðir sambært hesi kunngerð, undantikið § 11, stk. 2, kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

*Revsing og gildiskoma*

**§ 14.** Við bót verður revsaður tann, sum:
1) ikki hevur nøktandi skilhald sambært § 3,
2) ikki boðar frá rottu sambært § 4, stk. 1,
3) ikki letur neyðugar upplýsingar sambært § 4, stk. 3,
4) ikki lýðir boð frá kommunustýrinum ella Umhvørvisstovuni sambært § 4, stk. 2, § 5, stk. 2 og 4.
5) ikki kunnar sambært § 5, stk. 5 og § 6, stk. 2 og 3,
6) ikki heldur verndartiltøk sambært § 7, ella
7) ikki setur yvirvøku av rottu og týning í verk sambært §§ 8 og 9,
8) ikki goymir og handfer rottueitur forsvarliga sambært § 10, ella
9) ikki lýðir boð sambært § 11, stk. 1 ella stk. 3

*Stk. 2.* Feløg v.m.(løgfrøðiligir persónar), koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini. Somuleiðis kunnu kommunurnar, kommunalar havnir og interkommunalir felagsskapir revsast fyri brot á reglurnar í hesi kunngerð.

**§ 15.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 20 frá 16. mai 1962 um oyðing av rottu, sum broytt við kunngerð nr. 61 frá 6. november 1962.